## Listatúrur til Sandoynna

Leygardagin 21. juni er ætlanin at skipa fyri einum listatúri í Sandoynni. Túrurin byrjar á kaiini í Skopun (myndin) kl. 11. Súsanna í Jákupsstovu verður ferðaleiðari. Farið verður við bussi úr Skopun og runt til hinar bygdirnar í oynni, har nógv spennandi er at síggja. Fyrst verður farið til minnisvarðan í Skopun, síðani til Sands har m.a. Listasavnið og kirkjan verða vitjað. Eftir tað verður farið til Skarvanesar, har Poul Jákup Thomsen borðreiðir við kaffi og heimabakstri og sigur frá Díðrikki á Skarvanesi. Aftaná gongur leiðin til Skálavíkar og Húsavíkar, har nógv forvitnisligt er at síggja og hoyra, og síðani verður vitjað í Dali. Tilmelding er neyðug, og kann hon gerast á Sandoyar Kunningarstovu á tel. 361836 ella tpost sandinfo@olivant.fo. Pláss er í mesta lagi fyri 20 fólkum, og verður túrurin bert gjørdur um 14 fólk boða frá luttøku.



## Nógv fenol-dálking í Føroyum

Fenol-dálkingin er eins umfatandi í Føroyum, sum í okkara grannalondum, vísir ein felags norðurlendsk kanning. Hetta skrivar heimasíðan hjá Kringvarpinum. Fenol verður nógv brúkt í vaskievnum, og tá ið ymisk plastevni verða framleidd, og nøkur av fenolunum virka sum kynshormon og eru undir illgruna at gera menn minni fruktagóðar.

# Petur Pólson og brennivínsdevlarnir

**Stríðið við brennivínsdevulin og aðrar illar andar er drívmegin aftanfyri nýtt yrkingasavn, sum yrkjarin og tónleikarin Petur Pólson gevur út í næstum**

YRKINGSAVN
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

”Hamskifti” er heitið á nýggja yrkingasavninum hjá Peturi Pólson, sum kemur út í næstum. Í savninum eru 30 yrkingar, yrktar í tíðarskeiðinum 2002 til 2006.

Sjálvur sigur høvundurin, at hetta var eitt tíðarskeið við sera stórum, persónligum rembingum, ið merkja yrkingarnar. Ein leitan eftir sínum innasta samleika ber gjøgnum alt savnið, ið setur spurningar, heldur enn at koma við svari.

### Turrumegin tilveruna

Við nýggja savninum eru sjey ár liðin, síðani Petur Pólson gav út eitt yrkingasavn.

”Í somu sjey ár hevur Petur livað turrumegin tilveruna. Dysturin við brennivínsdevulin og aðrar illar andar gerst í hesum savni drívmegin at fata borgarligu tilveruna og seta hana í glas og rammu, sum menniskja, pápi og lærari,” skrivar Birgir Kruse millum annað í fororðunum til ”Hamskifti”.

Hóast nógvar av yrkingunum tykjast daprar við heitum sum ’InnanAngist’, ’Mín sál er troytt’ og ’Bundin’, er oftast okkurt, sum lyftir tær upp frá og snarar teimum á aftur. Ein farri av iva, eitt vet av undran og forvitnir neistar av gleði tamba áhaldandi yrkingarnar, eins og røddin í teimum illa vil sleppa orðunum – ella lívinum aftur.



*Stórar persónligar rembingar merkja nýggja yrkingasavnið, ”Hamskifti”, hjá Peturi Pólson. Serstøku permumyndina eigur Heidi Andreassen*

### Vakt ans

Petur Pólson hevur javnan vakt stóran ans sum yrkjari. Eitt nú, tá hann í 1997 gav út savnið ”Ongin sól er til”, ið gav honum Mentanarvirðisløn M.A. Jacobsens fyri fagrar bókmentir.

Petur Pólson hevur eisini verið virkin á føroyska tónleikapallinum. Fyrst við bólkinum Visible Fish, síðani við bólkinum Clickhaze. Í 2005 gav hann út sína fyrstu sololfløgu, Koma, ið vann stóra viðurkenning í Føroyum eins væl og uttanlanda. Í løtuni er hann í ferð við at gera sína næstu fløgu. Dagliga starvast Petur sum lærari á Miðvágs-Sandavágs skúla, umframt at hann eisini skrivar á nýggja vágaportalinum.

Tað er forlagið Grønhólmur, ið gevur savnið út, sum væntast at vera í bókabúðunum fyrst í juli mánað.

## Tunglyndi

*summar dagar*
*veit eg onga vón*

*framtíðin spyr meg*
*torskildar spurningar,*
*sum eg ikki havi*
*dirvi at svara*

*veit ikki, um eg*
*eri um at gerast gamal*

*kenni meg tíðum*
*eldri enn fjallið,*
*eg búgvi undir*

*summar dagar sakni*
*eg at sita einsamallur*
*inni í einum myrkum rúmi*
*og lata glottarnar ansa*
*sær sjálvum eina løtu*

*so eg sleppi undan*
*at taka støðu til,*
*um mær leingist eftir*
*at koma út aftur*
*millum tey livandi*

*droymi spøkilsi*
*í loyndum og gerist*
*spakuliga eitt ekkó*
*av onkrum farnum,*
*sum eg sjálvur*
*havi manað fram*

*setist aftur*
*og gerist eitt*
*við hitt fullkomna*
*myrkrið*

*Úr ”Hamskifti”, Petur Pólson, 2007*

# Serlig bútilboð til heimleys

**Landsstýrismaðurin í almannamálum hevur nú heimild til at veita stuðul til serlig bútilboð til persónar við stórum sosialum trupulleikum**

HEIMLEYS
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosalurin.fo*

Við kunngerðini um serlig bútilboð verður farið undir eitt skipað samstarv ímillum tað almenna og sjálvbodnar felagsskapir. Kunngerðin um serlig bútilboð, sum varð lýst fríggjadagin, gevur Almannastovuni heimild at veita stuðul til sjálvbodnar felagsskapir, ið skipa serlig bútilboð til heimleys.

Kunngerðin ásetir eisini nærri reglur um rakstur av serligum bútilboðum. Landsstýrismaðurin í almannamálum fekk, við løgtingslóg nr. 31 í lóg um forsorg frá 30. apríl 2007, heimild at skipa ella góðkenna serlig bútilboð til persónar við víðfevndum sosialum trupulleikum, sum ikki eru førir fyri at útvega sær ella fasthalda ein varandi bústað.

Nýggja kunngerðin um serlig bútilboð ásetir, hvørjar reglur og treytir eru fyri at skipa og reka eitt slíkt bútilboð. Tað eru sjálvbodnir felagsskapir, sum hava sjálvboðin sosial hjálparátøk sum týðandi part av sínum grundarlagi, ið kunnu søkja Almannastovuna um stuðul til serlig bútilboð.



*Fyri nøkurm vikum síðani keypti Frelsunarherurin gamla Kaggan til herbeg. Sjálvbodnir felagsskapir kunnu nú søkja um stuðul til slíkt virksemi*